## Minnast tey sum doyðu í flóðalduni

Í gjár vóru trý ár liðin, síðan herviliga flóðaldan beindi fyri 230.000 fólkum í Asiu. Í hesum sambandi vóru fleiri minningarhald ymsastaðni kring um heimin, serliga í teimum londum og býum, har flóðaldan gjørdi mest um seg. Fólk, sum yvirlivdu vanlukkuna, familjur, vinir og kenningar, mintust dagin við blómum og bønarhaldi. Út við helmingurin av teimum, sum lótu lív, vóru stødd á Aceh á Sumatra, meðan 45.000 fólk doyðu í Indiu og Sri Lanka. Í Thailandi doyðu í minsta lagi 5.000 fólk, harav helmingurin vóru útlendsk ferðafólk. Indonesiska kvinnan Nur Aini misti mann og tvey av trimum børnum teirra, tá ið flóðaldan velti inn yvir landið.

- Vit biðja fyri teimum í dag, sjálvt um vit ikki vita, hvar tey eru jarðað. Barnið, sum eg hevði eftir, rópar enn eftir pápa sínum, sigur hon. Trý ár eftir vanlukkuna eru 100.000 nýggj heim bygd í Aceh á Sumatra. Bygdir eru eisini nýggir skúla, sjúkrahús og vegir. Í Thailandi hava fólk eisini verið við strendurnar í dag fyri at minnast dagin, og nógv hava kastað reyðar rósur í havið við Patong-strondina í Phuket, har nógv hotellir og matstovur eru. Fólk vóru savnaði ymsastaðni í Phang Nga, Phuket og Krabi, har næstan líka so nógv ferðandi leita sær aftur, sum fyri herviligu flóðalduna 2. jóladag fyri trimum árum síðan.



# kiflotanum



*Myndin er tikin á bryggjuni í Saltangará 6. januar í ár, tá ið Polarhav og Stjørnan komu aftur av roktúri, samstundis sum Bakur og Stelkur landaðu á øðrum túri eftir heilt fáum døgum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Eingin leingjan**

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag sigur, at felagið fer ikki at ganga við til, at oljan fer av óbýttum. So leingi, sum Føroya Reiðarafelag ikki vil sleppa hesum, heldur hann ikki, at feløgini hava nakað at tosa um. Sum er, fer oljan av óbýttum hjá línuskipum og verksmiðjutrolarum, men reiðararnir bera oljuna hjá restini av fiskiskipaflotanum.

Undir samráðingunum beyð Føroya Reiðarafelag sær eisini til at leingja verandi sáttmála, og tað merkir, at oljan ikki hevði farið av óbýttum hjá fleiri skipabólkum enn teimum verandi.

Spurningurin er so, hví formaðurin í Føroya Fiskimannafelag ikki vil leingja verandi sáttmála og soleiðis kann sleppa fiskimonnum undan luttøku í enn fleiri oljuútreiðslum.

- Nei, vit vilja ikki leingja sáttmálan í verandi líki. Vit hava havt ymisk uppskot um tillagingar og broytingar, sum vit meta skulu koma við í ein nýggjan sáttmála. Haraftrat kemur so spurningurin um eftirlønina, sum ongan veg er komin.

Jan vísir á, at eitt av málunum, sum felagið hevur reist, er spurningurin um túralongd.

- Yvirmenninir hava í sínum sáttmála, at túralongdin hjá teimum í mesta lagi er hálvan triðja mánaða, meðan túralongdin hjá okkara limum í mesta lagi kann vera tríggjar mánaðir.

**Protokollátini**

Jan Højgaard heldur ikki, at nógvur dugur er í teimum protokollátum, sum feløgini hava gjørt sínámillum.

- Nú samráðingar hava verið, hevur fleiri ferðir verið vent aftur á protokollátið um møguliga luttøku hjá manningini í hækkandi oljuútreiðslunum, men eg haldi ikki, at vit eiga at taka hetta fyri meira, enn tað er. Feløgini hava gjørt nógv protokollát av ymiskum slagi, eisini protokollát, sum áttu at tænt fiskimonnum til fyrimunar, men vit hava einki sæð til, at reiðararnir hava kenst seg bundnar av hesum.

Formaðurin í Føroya Fiskimannafelag vísir á, at tá ið protokollátið um olju á sinni kom í sáttmálan, varð hetta smoygt niðuryvir høvdið á stjórnarlimunum í felagnum.

- Tað stóð í botni, og hetta var uppundir endan av samráðingunum. Stjórnarlimirnir hjá okkum góðtóku fyri frið skuld at taka hetta við í seinasta sáttmála, sigur Jan Højgaard.



*Avgerðin at lata deildina hjá Føroya Banka á Eiði aftur, kemur dátt við mongum íbúgvum í kommununi*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Mótmælir afturlating av banka

**Eiðis kommuna mótmælir harðliga ætlanini hjá Føroya Banka at lata deildina á Eiði aftur og heitir staðiliga á stjórar bankans um at umhugsa avgerðina av nýggjum**

BANKAVIRKSEMI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tordur J. Niclasen, borgarstjóri í Eiðis kommunu, hevur kommunurnar vegna sent stjórunum í Føroya Banka eitt mótmælisskriv um ætlanina at lata bankadeildina á Eiði aftur.

- Tað harmar okkum almikið, at ætlan tykkara er at lata deildina á Eiði aftur frá ársbyrjan 2008. Henda avgerð tykkara kemur uttan iva mongum íbúgvum í Eiðis kommunu illa við – og serliga teimum, sum ikki hava lagt seg eftir at nýta heimagreiðsluna.

**Miðsavningarrák**

Í mótmælisskrivinum sigur borgarstjórin seg ásanna, at ætlanin hjá Føroya Banka er eitt framhald av tí „miðsavningarráki", ið hevur gjørt seg galdandi kring landið tey seinnu árini.

- Vit vilja tí harðliga mótmæla hesi ætlan tykkara og heita staðiliga á Føroya Banka um at umhugsa hesa avgerð av nýggjum, sigur Tordur J. Niclasen, borgarstjóri.

Mótmælisskrivið er stílað til stjórarnar í Føroya Banka í Húsagøtu 3 í Havn.

# Jóhan Páll formaður

VINNULÍV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á Eiði er nógv vinnulív.

Framleiðsluvirkir eru á havnalagnum, og skip og bátar eru heimahoyrandi í bygdini.

Aftanfyri ein part av hesum virksemi stendur vinnulívsmaðurin, Jóhan Páll Joensen, sum eisini er nevndarformaður í Føroya Banka.

Bankin hevur gjørt av at lata fleiri deildir aftur kring landið, og ein av hesum er deildin hjá bankanum á Toftum, har eisini nógv vinnulív er.

Tað er merkisvert, so lítið hevur verið at hoyrt um hesar afturlatingar, men Eiðis kommuna er so ein teirra, sum nú hevur gjørt av at mótmæla.